Nr. 101 - 29. mai 2004 Sosialurin FISKIVINNUBLAÐIÐ 2004 13

# Skal stýrast við harðari hond

**Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag heldur, at skal fiskidagaskipanin má stýrast við harðari hond. Men her heldur hann, at politiska skipanin hevur svikið**

FISKIDAGASKIPANIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Føroyska fiskidagskipanin verður ikki umsitin nóg væl og tískil vita vit í veruleikanum heldur ikki, hvar vit flóta, heldur Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum*

– Fiskidagaskipanin er kanska góð. Men vit vita tað ikki við vissu, tí hon verður ikki umsitin á fullgóðan hátt. Sostatt hava vit heldur ongi prógv fyri, hvussu skipanin virkar.

Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag er ein av teimum, sum ætlar sær á fiskivinnuráðstevnuna, sum Farec skipar fyri í Havn fyrst í juni.

Òli Jacbsen hevur altíð havt greiðar meiningar um føroyska fiskivinnu og um fiskiskap og tær meningarnar hava ofta gingið upp á tvørs av vanligu hugsanini hjá alment góðtiknu fiskifrøðini.

Og hann mælir til eitt ávíst varsemi, nú vit ferð eftir ferð síggja og hoyra føroysku fiskidagaskipan lovprísaða í nógvum londum, og nú føroyskir politikarar ferðast land og ríki runt at greiða frá -fyri ikki at siga, reypa- av fiskidagaskipanin.

– Eitt er so púra greitt og tað er, at fiskidagaskipanin skapar ongan fisk og hon er heldur ongin trygd ímóti sveiggum í fiskiskapinum.

– Kanska hevur fiskidagaskipanin staðið í einum ov glæsiligum ljósi, tá ið samanum kemur, heldur Óli Jacobsen.

Hann sigur, at tá ið hann er komin á tal við útlendingar, sum eru áhugaðir í okkara fiskidagaskipan, hevur hann víst teimum á, at eftir hansara tykki er ein avgjørd fortreyt fyri, at fiskidagaskipanin skal virka, at politiska skipanin alla tíðina fylgir henni upp og hevur tamarhald á tí, sum fer fram.

– Og tað kunnu vit ikki siga, at politiski myndugleikin í Føroyum hevur gjørt.

– Vit kunnu ikki siga, at politikararnir hava stýrt fiskidagaskipanini serliga sannførandi, elggur hann afturat.

Óli Jacobsen sipar til tey ørkymlandi viðurskiftini, sum hava verið í fiskimálaráðnum við teimum nógvu ivamálinum í sambandi við at leggja fiskiloyvi saman o.s.fr.

– Somuleiðis vita vit heldur ikki, hvussu gongdin í fiskiorkuni hevur verið hesi seinastu árini. Kanska hevur gongdin verið áleið, men vit vita tað ikki, tí politiski myndugleikin fylgir ikki við.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum sigur, at ein avgjørd fortreyt fyri fiskidagaskipanini er, at hon verður stýrd við harðari hond.

– Vit kunnu gott hava okkara hugsan um, at fiskidagaskipanin í útgangsstøðinum er góð. Men tað krevur, at hon verður stýrd. Tað er sum við ferðslureglunum. Í Føroyum hava vit ikki loyvi at koyra meiri enn 80 ímillum bygdir, men so er eisini neyðugt at syrgja fyri, at vit ikki koyra meiri enn 80.

Men her heldur heldur Óli Jacobsen, at føroyskir myndugleikar hava svikið.

– Vit kunnu ikki siga, at føroyskir myndugleikar hava stýrt fiskivinnunevndini yvirhøvur.

Óli Jacobsen sigur, at manglandi effektiviteturin í føroysku umsitingini er eisini galdandi á hesum øki.

– Sostatt kunnu vit avgjørt staðfesta, at føroyska fiskidagaskipanin er ikki bara ein sólskinssøga, leggur formaðurin í fiskimannafelagnum afturat.

– Tað er onki paradís, har ikki onkur ormur er og veruleikin er, at í sambandi við fiskidagaskipania, vita vit ikki, hvar vit flóta.

Kortini heldur Óli Jacobsen, at kvotuskipanir eru óbrúkiligar, serliga, har talan er um blandaðan fiskiskap. Har er fiskidagaskopanin helst tað nærmasta, vit koma eini góðari skipan. Men tað krevst altso, at hon verður stýrt við fastari hond og tað hevur haltað í Føroyum.

Tað hevur eisini verið funnist at, at ávísir skipabólkar, djúpvatnstrolarararnir og garnaskipini eru uttanfyri fiskidagaskipini - men garnaskipini fiska so onnur fiskasløg enn tey, sum fiskidagaskipanin er bygt á.

– Í grundregluni eiga allir skipabólkar at vera í fiskidagaskipani. Ella kann skipanin heilt skjótt fara á glið, heldur formaðurin í Fiskimannafelagnum.

## Hevur avgjørt havt eina missión

Fiskivinnuráðstevnan skal eisini umrøða spurningin um, hvussu væl ástøðið hjá fiskifrøðingunum svara til veruleikan.

– Hetta er ein partur av somu søk, sigur formaðurin í Fiskimannafelagnum.

Ofta hevur verið ført fram, at onki samsvar hevur verið ímillum ástøðið hjá fiskifrøðingunum um gongdina í fiskastovnunum og um ávirkanina á fiskiskapin, og veruligu gongdina í fiskiskapinum.

– Hetta hevur mangan elvt til byltingar ímillum fiskimenn og fiskifrøðingar. Men tað hevur eisini elvt til stríð ímillum almennu, góðtiknu fiskifrøðina og so íslendska fiskifrøðingin Jón Kristjánsson, sum brýtur fullkomiliga frá og hevur eina heilt aðra uppfatan.

– Báðir partar meta hin at vera at kalla trúarvillingar. Óli Jacobsen væntar ikki, at úrslitið av hesi ráðstevnuni verður, at almenna fiskifrøðin stendur fyri falli.

– Til tað er hon alt ov inngrógvin.

Men hann heldur avgjørt, at Jón Kristjansson hevur havt sína missión.

– Fyri nøkrum árum síðani varð tað, sum fiskifrøðingarnir søgdu, mett ájavnt við ein óreingiligan, bíbilskan sannleika. Ongin tordi og ongin hevði førleika til at seta spurnartekin við tað, sum fiskifrøðingarnir søgdu.

– Og sama um Jón Kristjansson hevur rætt ella ikki, so hevur hann í hvussu so er fingið okkum at hugsa og til at seta almennu fiskifrøðingunum spurningareisini spurningar, sum ikki verða svaraðir, tí teir ganga teimum ov nær.

– Sostatt hevur tað avgjørt ikki verið til fánýtis, at hesin íslendingurin trein inn á vøllin fyri nøkrum árum síðani.

Óli Jacobsen heldur, at tað er soleiðis í øllum lívsins viðurskiftum, at har bara ein meining er galdandi, er ov stórur vandi fyri at tey, við "røttu" meiningini, gerast ov hástór og tí er tað rætt og gagnligt, at tað verður birt uppundir til kjak og at spurningar verða settir. Og tað hevur umstríddi íslendingurin í hvussu so er megnað.

Og fyri at vera í tí bíbilska, samanber formaðurin í Fiskimannafelagnum hetta við uppfatanina av bíbliuni.

– So leingi bíblian vara var á latíni, vóru tað bara nakrir fáir skriftlærdir, sum kundu lesa hana og tulka hana. Ongin annar hevði førleika til at seta spurningar og at gera sínar egnu metingar.

– Tann møguleikin kom ikki, fyrrenn bíblian varð týtt til tey ymsu tungumálini.

## Ómøguligt at spáa

Óli Jacobsen hevur nú verið formaður í Fiskimannafelagnum í ein mansaldur. Men hann heldur seg kortini ikki til at spáa um, hvussu fiskivinnan í Føroyum sær út um 10 ár.

– Hevði eg øll hesi árini, eg havi verið formaður, skula mett um støðuna í fiskivinnuni árið eftir, skuldi tað nokk víst seg, at eg ongantíð hevði fingið rætt.

– So ring er fiskivinnan at rokna út, at tað ber nóg illa til at meta eitt ár fram í tíðina.

Tí fer Óli Jacobsen als ikki at spáa um framtíðina.

– Tað vildi verið fáfongt, heldur hann.

Ein stórur spurningur er hesa seinastu tíðina, er lønsemið í føroysku fiskivinnuni.

Tað ásannar Óli Jacobsen eisini. Men hann heldur, at hetta er ein størri trupulleiki hjá teimum, sum skulu liva av fiskivinnuni á landi.

– Men sjálvsagt er tað eisini ein samfelagsligur trupulleiki. Men enn hevur so ongin verið førur fyri at svara uppá, hvussu hann kann loysast.

Og tað hevur hann heldur ikki svarið upp á.

## Kann bara blíva klókari

Fiskivinnuráðstevnan, sum verður í Føroyum fyrst í juni, er helst tann største og mest umfatandi, sum hevur verið í landinum.

Og formaðurin í Fiskimannafelagnum er eisini eitt sindur spentur uppá stevnuna.

Hann heldur avgjørt, at evnið á ráðstevnuni er sera viðkomandi.

Talan er um eitt sera stórt og umfatandi mál. Leitanin eftir teirri fullkomnu skipanini, fær serfrøðingar av ymsum slagi og politikarar ferðast heimin runt at kanna eftir, hvørjar skipanir ymisk lond brúka til at stýra fiskiskapinum við.

Og á ráðstevnuna í Havn koma eisini serfrøðingar úr nógvum ymsum londum og av nógvum ymsum slagi.

– Sostatt kunnu næstan bara blíva klókari av eini slíkari ráðstevnu.

Tað, sum hann er mest spentur uppá, er at hoyra ísraelan, Menakhem Ben-Yami, leggja fram.

– Tann 77 ára gamli Menakhem Ben-Yami er fiskimaður og hann hevur drúgvar royndir av fiskiskapi um allan heim og av teimum ymsu skipanunum, sum verða brúktar at stýra fiskiskapinum við runt íkring og, hvussu tær hava eydnast.

– Tað verður serliga áhugavert at hoyra ein so royndan og vitandi fiskimann sum hendan, siga sína hugsan um viðurskiftini.

– Og hansara styrki er avgjørt, at hann er ikki teoretikari, men fiskimaður og sostatt er hann tí helst eisini førur fyri at siga sína hugsan á einum vanligum máli, sum øll skilja, heldur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag.



*- Fiskidagaskipanin skapar ongan fisk og tað er heldur onki paradís, har ikki onkur ormur er eisini, sigur formaðurin í Fiskimannafelagnum*

D6-310 DP OKKARA MEST EFFEKTIVI DIESEL MOTORUR NAKRANTÍÐ



Tann nýggi D6-310. Við 6 sylindarum,
310 hestum, elektroniskt stýrdum
"common rail" brennoljuinnspræning,
og tí nýggja DP drevinum, fært tú siglifførleikar,
sum yvirganga allar aðrar diesel motorar við Z-drevi.
Brennoljunýtslan og útstoytsútlatið er merkiligani lágt.
D6 er 5.5 litur, men við ísetanarmálum á einum 4 liturs motori,
er tað nú møguligt at íseta meiri kraft í sama pláss.
Setur nýtt støði fyri diesel styrki...




les tíðindini á www.volvopenta.com

VOLVO PENTA

Bátatænastan P/F
Gríms Kambansgøta 4 · Postsmoga 101
FO-110 Tórshavn · Tel 311735 · Fax 313835